# 33.106 fólk fara á val í dag

**Heili 33.106 fólk hava valrætt til fólkatingsvalið í dag. Hetta er væl størri enn við seinasta fólkatingsval. Søgan sigur okkum tó, at valluttøkan til fólkatingsval ikki plagar at vera serliga stór**

FÓLKATINGSVAL
*Heri á Rógvi*

Tað er nokk gingið upp fyri teimum flestu, at fólkatingsval er í dag. Í øllum ríkinum skulu fólk á val í dag. 179 limir seta í fólkatinginum. Av teimum 179 eru tvey umboð úr Grønlandi og tvey umboð úr Føroyum. Í Danmark skulu fólk bæði velja til fólkatingi og bý- og amtsráð.



*Føroyingar skulu velja á 69 ymiskum valstøðum í dag. 33.106 fólk hava valrætt*

Hetta sleppa vit í Føroyum undan á hesum sinni.

Í Føroyum er tað soleiðis, at tað í búgva 46.889 fólk í Føroyum. Av hesum hava 33.106 fólk valrætt. Í lógini um fólkatingsval í Føroyum stendur at lesa:

§ 2. Valgret til Folketinget har enhver, som har dansk indfødsret, er fyldt 18 år og har fast bopæl i riget, medmindre vedkommende er umyndiggjort.

Hesi góðu 33.106 fólkini skulu velja á 69 ymiskum valstøðum kring landið. Nógv teir flestu veljararnir búgva í Tórshavnar Kommunu, 12.535 veljarar eru skrásettir í Tórshavnar Kommunu.

Við seinasta fólkatingsval høvdu 31.310 fólk valrætt í Føroyum. Bert 66,1 % av teimum, sum høvdu valrætt í 1998 valdu at fara á val. Tað skal so eisini sigast, at 66,1 prosent er munandi hægri enn til valið frammanundan hesum.

Valhølini kring landið lata upp kl. 9.00 og lata aftur kl. 20.00, men hava opið so leingi fólk koma. Úrslitið av valinum verður væntandi greitt umleið kl. 22.45.

# Ársins virki og átak kosin



*Poul Mohr fekk handað virðislønina, sum ímyndar búmerki hjá Vinnuhúsinum. Virðislønin er gjørd úr bronsu av Andrias Andreasen.*

**Tórshavnar Skipasmiðja fekk heiðurin at kalla seg ársins virki fyri 2001. Serstøðan hjá skipasmiðjuni varð staðfest í grundgevingini fyri virðislønina. North Atlantic Fish Fair fekk eisini eina heiðursløn fyri at besta átakið hetta seinasta árið**

VINNARAR
*Heri á Rógvi*
*Myndir: Jens Kristan Vang*

Fríggjadagin skipaði Føroya Arbeiðsgevarafelag fyri Vinnudegi í Norðurlandahúsinum. Tiltakið er vorðið eitt árligt afturvendandi tiltak, har føroyskt vinnulív hittist. Føroya arbeiðsgevarafelag ella Vinnuhúsið, sum teir eisini kalla seg, hevur á Vinnudegnum ymiskar fyrilestrar, har serfrøðingar á hvør sínum øki greiða frá. Í ár vóru tveir útlendskir fyrilestrarhaldarar eisini komnir til Føroya úr ávíkavíst Danmark og Norra. Føroysku fyrilestrarhaldarar vóru eisini á skránni. Ólavur Rasmussen, prestur, helt ein áhugaverdan fyrilestur um heimin eftir 11. september. Tað, sum kanska hevði størsta almenna áhugan á Vinnudegnum, var kjósanin av Ársins virki og Ársins átak, sum er ein nýggj heiðursløn.

## Skipasmiðjan

Tað er Tórshavnar Skipasmiðja, sum næsta árið kann kalla seg Ársins virki í Føroyum. Tað er hvørt mansbarn í Føroyum, sum kennir Tórshavnar Skipasmiðju, og ein fittur partur hevur eisini roynt at arbeitt har. Fyri teirra einamest virksemi hjá fyritøkuni í seinastuni fekk Poul Mohr handað heiðursgávuna, sum er ein lutur úr gróti, og sjálvandi eisini heiðurin komandi árið at vera Ársins virki í Føroyum.

Nevndin, sum varð sett at velja Ársins virki, legði í sínari grundgeving dent á ymisk viðurskifti. Tað verður sjálvsagt lagdur stórur dentur á, at virkið hevur givið fíggjarligt yvirskot. Í grundgevingini í ár verður sagt, at tað eru fleiri virki í Føroyum, sum lúka hesa fyrstu treytina, men Tórshavnar Skipasmiðja hevur í longri tíð givið yvirskot. Eisini verður sagt í grundgevingini, at Tórshavnar Skipasmiðja hevur eina serstøðu í føroyskum vinnulívið. Í grundgevingini verður skipasmiðjan eisini kallað fyri ein risa.

– Fyritøkan er eitt virðiligt umboð fyri føroyska vinnu og hevur væl uppiborið at verða útnevnt til ársins virki 2001. Tað er eitt trygt og eggjandi arbeiðspláss í støðugum vøkstri, sigur nevndin at enda í sínari grundgeving.

## Átakið

Nýggja virðislønin, ið varð latin í ár á Vinnudegnum, var Ársins Átak. Henda virðislønin verður latin til fyritøku ella persónar, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at stiðtakararnir til fiskivinnuráðstevnuna North Atlantic Fish Fair. Henda ráðstevnan varð hildin fyrr í ár, og hon savnaði hópin av fólki innan vinnuna í Føroyum eins og uttanlands.

– North Atlantic Fish Fair hava heiður uppibornan. Hetta tiltak kemur at gagna føroysku vinnuni og vil verða við til at seta land okkara á heimskortið. Smápartafelagið Atlantic Fair fær tí heiðursbræv fyri ársins átak 2001, varð sagt í grundgevingini.



*Umboð fyri Spf. Atlantic Fair fáa her handað heiðursbræv fyri Ársins átak 2001*



# Stongt í vikuvís

**Samanlagt eru deildir á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Landssjúkrahúsinum stongdar í 49 vikur í ár. Grundin er, at avloysarar ikki fáast, sigur landsstýrismaðurin. Tað er tvætl, tí pengarnir verða brúktir til fullveldið, svarar løgtingsmaður**

SJÚKRAHÚSVERKIÐ
*Edvard Joensen*

Ein deild á Klaksvíkar Sjúkrahúsið og fimm deildir á Landssjúkrahúsinum eru afturlatnar í tilsamans 49 vikur í ár. Maningartrot hevur skuldina, sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður við almanna- og heilsumálum.

Men tað er tvætl, sigur Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, sum vísir á, at undan kreppuni í nítiárunum, bar altíð til at fáa avloysarar, soleiðis at deildirnar vóru verðandi opnar í feriutíðini.

Tá kreppan kom vórðu ymsar deildir á sjúkrahúsunum stongdar orsakað av peningatroti. Væntandi var, at hetta fór at koma í rættlag aftur, tá kreppan var av, sigur Vilhelm Johannesen. Men so varð ikki. Grundin er, at landstýrið brúkar pengarnar til fullveldisætlanina, staðfestir hann.

## Visti ikki

Í valsending, sum var í Útvarpinum nú hetta kvøldið, segði Sámal Petur í Grund, at hann visti ikki, hvussu til stóð við hesum stongdu deildunum. Hann kendi eingi nágreinilig tøl, segði hann.

Vilhelm Johannesen sigur við Sosialin, at hann eftir hesa sendingina hevur kannað hesi tølini, og er komin til, at samanlagt er talan um 49 vikur í ár, har deildir eru stongdar.

Býtið er soleiðis, sigur Vilhelm Johannesen, at á Klaksvíkar Sjúkrahúsi er medisinska deil, Deild M, stongd í 10 vikur í ár.

Á Skurðdeplinum á Landssjúkraahúsinum er deild A3 stongd í 13 vikur í ár. Á medisinska deplinum er deild B7 stongd í 15 vikur.

Á Psykiatriska Deplinum er Deild 1 stongd í tvær vikur, meðan Deild 3 og Deild 5 eru stongdar hálvafimtu viku hvør. Tilsamans eru deildir í føroyska sjúkrahúsverkinum stongdar í 49 vikur í ár 2001, vísir Vilhelm Johannesen á.

Hann sigur, at tað er bara orsakað av manglandi játtan, at soleiðis er, og metir tað vera rættiligan kleyvarskap í eini tíð, har landskassin hevur havt meira enn eina hálva milliard í yvirskoti árliga, meðan til bar at hava opið áðrenn kreppuna, tá undirskotið var tilsvarandi.

– Men samgongan hevur so valt at seta pengarnar av til fullveldið, og tað hevur millum annað sjúkrahúsverkið goldið fyri, sigur Vilhelm Johannesen.

Hann heldur ikki, at tað kann passa heilt, at landsstýrismaðurin ikki kennir til stongdu deildirnar.

## Visti kortini

Og tað ger tað heldur ikki, sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður við almanna- og heilsumálum. Sjálvandi veit hann av, at deildir eru stongdar. Tað hava tær verið í árasvís. Men tað, sum hann ikki sigur seg vita, er, hvussu nógvar deildir eru stongdar, og hvussu leingi.

Tá hann verður gjørdur kunnugur tølini, Sosialurin hevur fingið, sigur hann, at hasi viðurskiftini liggja beinleiðis undir sjúkrahúsleiðslunum, og at Almanna- og Heilsumálastýrið sum so einki hevur við tey at gera.

At hann ikki kennir til tølini, kemst av, sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, at hann ongantíð hevur fingið nakra »útdjúpandi« frágreiðing, sum hann tekur til, frá sjúkrahúsleiðsluni.

Deildirnar eru vanliga stongdar um summarið umframt um jóltíðir og á páskum, Tá starvsfólkið hevur frí, sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður.

Grundin til, at deildirnar steingja, er ikki manglandi játtan, men væntandi starvsfólk, sigur landsstýrismaðurin.

Tað verður so hildið aftur í móti, at tey bæði tingini ofta plaga at hanga saman. Men hann heldur ikki, at tað er tí, at eingir pengar eru til lønir.

Hann vísir á læknarnar sum dømi. Teir fáa sanniliga góða løn. Men tað er bara ikki til at fáa læknar í Norðanlondum í dag, sigur hann. Læknatrot er allastaðni.

Men nú eru røktarstarvsfólk ikki beinleiðis læknaútbúgvin, verður hildið aftur í móti.

Tað viðgongur landsstýrismaðurin, men sigur samstundis, at tað ber heldur ikki til bara at seta einhvønn sum avloysara á eini deild.

Framvegis er Vilhelm Johannesen ikki nøgdur við, at deildirnar eru stongdar í vikuvís.

– Tá kreppan varð søgd at vera orsøkin til, at deildirnar stongdu á fyrsta sinni, átti at borið til at latið tær uppaftur, tá kreppan var av. Men tað er ikki áhugi fyri tí, tí pengarnir fara til fullveldið, sigur Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður.



*Sjúkrahúsverkið er offrað á fullveldisaltarinum, sigur Vilhelm Johannesen, sum vísir á, at tað bar til at hava deildir opnar við einari milliard minni í landskasanum, enn vit sambært landsstýrinum hava í dag*

